## UTTAN ÚR HEIMI

### Royndu at heingja seg

Amerikonsku hernaðarmyndugleikarnir vátta nú, at nógvir fangar í Guantanamo-herstøðini í Kuba hava roynt at beina fyri sær.

Fyrr hava myndugleikarnir sagt, at fleiri fangar royndu at skaða seg sjálvar í 2003, men nú viðganga teir, at í veruleikanum royndu 23 fangar at heingja seg í einum felags mótmæli. Sambært tíðindastovuni AP hendi tað, stutt eftir at generalurin Geoffrey Miller hevði fingið heimild til at nýta heldur harðligari framferð fyri at fáa fangarnar at avdúka tað, sum teir vistu.

Altjóða mannarættindafelagsskapurin Amnesty International heldur lítið um, at amerikanararnir hava dult tær nógvu sjálvmorðsroyndirnar í Guantanamo. Alistair Hodgett, talsmaður hjá AI í Washington, sigur við AP, at tíðindini vísa, hvussu tyngjandi tað er fyri fólk at verða sett í varðhald í óásetta tíð. Men tíðindini vísa eisini, hvusu langt Pentagon er sinnað at fara fyri at dylja tað, sum hendir í fangalegmuni har, sigur han.

Umleið 558 fangar eru í leguni í Guantanamo, og nógvir teirra hava verið har í meiri enn trý ár uttan dóm.

### Skilagóð avgerð

Heimsbankin kunngjørdi í gjár, at hann tekur undir við einari bretskari ætlan um at økja stuðulin til fleiri lond í Afrika. .

Bretska stjórnin hevur gjørt av, at Bretland skal gjalda 10 prosent av tí, sum 70 menningarlond lond skylda Heimsbankanum og afrikanska menningarbankanum. Tað ger, at Bretland skal gjalda góðar 10 milliardir krónur, men aftur fyri verður kravt, at londini skulu brúka teir spardu pengarnar til at bøta um heilsuverkið og skúlaverkið og til ymisk vælferðartiltøk. Fleiri lond hava víst bretsku avgerðini stóran áhuga, og Tanzania hevur sum tað fyrsta landið skrivað undir sáttmála við Bretland.

Sambært BBC hava meiri enn 315 milliónir fólk í londunum sunnan fyri Sahara minni enn ein dollara at liva fyri um dagin, og framrokningar hjá einum suðurafrikonskum stovni vísa, at talið verður oman fyri 400 milliónir um tíggju ár. Sambært ST vísir ein nýggj kanning, at tey ríku londini mugu økja hjálpina til Afrika 60 prosent, skal tað muna nakað.

### Fiskimenninir fækka

Talið á fiskimonnum í Noregi er minkað nógv tey seinastu árini, og minkingin heldur fram.

Tøl hjá fiskimálaráðnum vísa, at um ársskiftið vóru 15.733 fiskimenn í Noregi, og tað er níggju prosent færri enn fyri einum ári síðani. Tey seinastu fýra árini er talið minkað 22 prosent, og samanborið við 1990 eru fiskimenninir heili 43 prosent færri í tali nú, sigur fiskimálaráðið. Tey vísa tó á, at tað eru serliga teir, sum hava havt fiskivinnuna sum hjávinnu, sum eru fækkaðir.

Tølini hjá norska fiskimálaráðnum vísa, at tað eru serliga eldri men, sum hvørva úr fiskivinnuni. Eitt nú vóru meiri enn 3.000 menn, sum vóru farnir um tey 70, skrásettir sum fiskimenn fyri fýra árum síðani. Tað talið er nú farið niður um 1.500.

### Kanna havbotnin

Myndugleikarnir í Indonesia hava givið einum ransóknarskipi hjá bretska herflotanum loyvi at kanna havbotnin, har tann harði jarðskjálvtin var annan jóladag.

Bretska skipið hevur útgerð, sum kann kanna havbotnin niður á 5.000 metra dýpi, og í fyrsta lagi ætla vísindamenn at kanna, hví jarðskjálvtin var júst har, og um tað ber til at varskógva um komandi skjálvtar í góðari tíð.

Samstundis hava indonesisku myndugleikarnir kunngjørt, at jarðskjálvtin og flóðaldan kravdu meiri enn 228.000 mannalív har, og at nú eru ongar vónir um at finna fleiri aftur á lívi. Sostatt kravdu jarðskjálvtin og flóðaldan annan jóladag meiri enn 280.000 mannalív.



*Viktor Jusjtsjenko og Vladimir Putin undan fundinum teirra millum í Kreml*
*Mynd: Reuters*

# Valdi sær umstríddan forsætisráðharra

**Nýggi forsætisráðharrin í Ukraina, Julia Tymosjenko, er skuldsett fyri svik í Russlandi**

TILNEVNING
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Nýggi forsetin í Ukraina, Viktor Jusjtjsenko, kunngjørdi undir vitjan síni í Moskva, at hann hevði gjørt av at velja ein av sínum trúgvu stuðlum, Juliu Tymosjenko, til forsætisráðharra. Forsetin segði seg hava havt fleiri evni til forsætisráðharrastarvið, og at Julia Tymosjenko var tað besta egnaða.

Tað eru kortini ikki allir ukrainar, sum eru serliga fegnir um avgerðina. Har eysturi í landinum er hon illa lýdd, tí fleiri halda hana vera ov ágangandi. Hon er heldur ikki serliga væl umtókt ímillum vinulívsfólk, skrivar AP.

AP veit ikki, um russiski forsetin, Vladimir Putin, hevði nakra viðmerking til avgerðina hjá Jusjtsjenko at velja Juliu Tymosjenko til forsætisráðharra. Men tíðindastovan heldur, at hetta er sum at vísa tarvi reytt, tí russar hava skuldsett Juliu Tymosjenko fyri svik. Skuldsetingin stavar frá teirri tíðini, tá hon var stjóri í almenna ukrainska gassfelagnum.

Eygleiðarar halda, at tilnevningin var ætlað at vísa russisku leiðarunum, at Ukraina tilskilar sær rætt til at taka egnar avgerðir, og at landið kennir seg ikki so bundið at leiðsluni í Moskva longur. Kortini segði Viktor Jusjtsjenko, at Russland er framvegis tað týdningarmesta samstarvslandið hjá Ukraina, og at hann ætlar sær at varðveita tað góða sambandið eystureftir, hóast hann eisini fer at virka fyri at fáa betri samband við ES.

# Neyvan Lykketoft

**Donsku sosialdemokratarnir skulu hava meiri enn 200.000 atkvøður afturat fyri at vinna stjórnarvaldið**

FÓLKATINGSVAL
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Enn bendir einki á, at tað fer at eydnast donsku Sosialdemokratunum at koppa stjórnini hjá Andetrs Fogh Rasmussen.

Ein nýggj veljarakanning vísir tvørturímóti, at undirtøkan hjá flokkinum er minkað, síðani fólkatingsvalið varð útskrivað. Kanningin gevur Sosialdemokratunum 26,7 prosent av atkvøðunum ímóti 27,5 prosentum, beint áðrenn Anders Fogh Rasmussen boðaði frá valinum. Á seinasta vali fekk flokkurin 29,1 prosent.



*Mogens Lykketoft verður neyvan forsætisráðharri á hesum sinni*

Vinstri hevur eisini havt afturgongd teir seinastu dagarnar. Nýggja kanningin gevur flokkinum 32,5 prosent, og tað er 1,3 prosentstig minni enn fyri einari góðari viku síðani. Vinstri liggur tó framvegis oman fyri tey 31,2 prosentini, sum hann fekk á seinasta fólkatingsvali.

Sambært einari kanning hjá Vilstrup-stovninum skulu Sosialdemokratarnir fáa 218.000 atkvøður afturat fyri at vinna valið tann 8. februar. Um somu tíð undan seinasta fólkatingsvali vantaði teimum 105.000 atkvøður, og tá eydnaðist teimum ikki at vinna. Tvørturímóti øktist munurin sjálvan valdagin, skrivar Politiken.